

*Útsýnið er ótrúliga gott, bæði í góðveðri og ódn*

*Ja, hann (Palli Gregoriussen, blðm.) er ótrúligur. Hóast hann er komin langt upp í 70'ini, er hann kortini smekkfullur av góðum hugskotum*

*Hetta er eitt ótrúligt stað. Her kanst tú eygleiða fuglar sum flúgva beint fram við vindeyganum. Hyggur tú út í sundið, kanst tú fáa eyga á kóp og æður, sum spæla sær í sjónum*





## FAKTA

**Bakkastova við Ljósá**
**Vídd:** Tvær hæddir – onnur 100 og hin 40 fermetrar
**Kømur:** Trý kømur, tvey baðirúm og sauna.
**Byggikostnaður:** Góðar tvær mió krónur
**Heimasíða:** ognir.fo

ið kundu brúkast til mong ymisk endamál – bæði til bústað, skeið, samkomur og annað.

Til tess at tryggja sær at althettakundisamantvinnast í eina eind, var neyðugt við eini góðari tekning. Ludvík gjørdi ikki mætari, enn at biðja arkitektin Palla Gregoriussen um at standa fyri hesum.

- Ja, hann er ótrúligur. Hóast hann er komin langt upp í 70'ini, er hann kortini smekkfullur av góðum hugskotum.

- Eg haldi, at úrslitið er sera gott, sigur Ludvík við einum brosi, samstundis sum hann nýtir tað vakra útsýnið norður í Eiðisflógvan og suðureftir gjøgnum Sundalagið.

### Ódnir einki at siga

Tað er ikki einfalt at greiða frá øllum tí sum er í húsunum og hvussu væl litirnir sampakka. Hetta munnu myndirnar siga betri frá.

Staðfestast kann tó, at útsýnið hiðani er sera gott, og, sum Ludvík tekur til: - Her er so eingin skaðaætt!

Sjálvur var hann her undir báðum teimum herviligu ódnunum herfyri, tá húsini av sonnum skuldu standa sína roynd í føroyska veðurlagnum.

- Eg var inni í húsunum, tá ódnirnar leikaðu í sum harðast. Tað ýldi og leikaði í uttanfyri og glaður fóru gjøgnum Sundalagið, men Bakkastova stóð báðar royndirnar!

- Her inni hoyrdist ikki eitt einasta brak, tí alt er límað og skrúvað so væl saman, sigur Ludvík, sum hevur verið sera fegin um byggiarbeiðið hjá Adriani Joensen úr Leirvík og Jackie Joensen úr Havn.

### Ikki standa tóm

Tá Ludvík lat hesi húsini byggja, stóð honum greitt at tey skuldu brúkast. Sjálvur eigur hann hús í Havn, men ætlanin hvørki var ella er at Bakkastova skal standa tóm ella óbrúkt.

Herfyri høvdu hann og konan 30 ára brúdleypsdag, og varð hesin dagurin hildin her. Borðreitt varð á rundum borðum til eini 30 fólk.

- Her var gott pláss til okkum øll. Her kundu saktans havt verið eini 20 fólk aftrat uttan nakran trupulleika, slær Ludvík fast.

Í farnu viku valdi hann tí at lýsa við, at fólk vóru vælkomin at støkka inn á gólv í Bakkastovu. Sama innbjóðing fór í hvørt hús við Ljósá, og mundu flestu av bygdarfólkunum vera á gátt hjá Ludvíki.

Umframt húsini sjálvi, fáa tey vitjandi eisini møguleika at síggja, hvussu nútíðar og litfagrir møblar hóska inn í eini nútíðar hús.

Sonur hansara, Dánjal Petersen rekur Home Design, og her er eitt sera gott høvi at marknaðarføra nakað av teirra møblum uttanfyri sjálvan handilin á Sandvíkarhjalla.

- Fólk hava eisini víst áhuga at keypa hesi húsini, men nú fáa vit at síggja, sigur Ludvík.









*Húsini hava kostað Ludvíki Petersen oman fyri tvær mió krónur, og ein sær at væl er fingið fyri peningin*